# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, partvís heglingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.



*Sjálvt um tey eru lítil, so royna tey kortini. Hesi bæði fittu børnini vóru eisini á barnabókasavninum og kliptu gekkaskortar*



*Á barnabókasavninum kliptu tey gekkaskortar hósmorgunin. Her er tað ein Batman, sum kom burturúr*

# Tey kliptu gekkaskortar

**Á barnabókasavninum í miðbýnum í Havn kliptu tey hósmorgunin gekkaskortar. Mánadagin er tað føstalávint, og skulu gekkaskortarnir helst brúkast tá**

GRÝLUR
*Ingrid Bjarnastein*

Hósmorgunin var nógv lív á barnabókasavninum í miðbýnum í Havn. Tá skipaði bókasavnið nevniliga fyri klipping, har børn undir skúlaaldur kundu koma at klippa sær ein gekkaskort nú føstalávint veruliga nærkast.

Børnini vóru nógv í tali, og sótu tey øll fitt og kliptu og límaðu. Onkur hevði gjørt sær ein Batman gekkaskort, onkur eitt jarðber, onkur var ein mariuhøna og onkur annar var okkurt annað.

Nógvar dagrøktarmammur við børnum og barnagarðsbørn vóru komin á bókasavnið henda morgunin, og merktiskt tað týðiliga á børnunum, at tey gleddu seg til føstalávint.

Men nú skulu tey bert sova tríggjar ferðir afturat, so sleppa tey út at royna nýggju gekkaskortarnar og at vita, um tey ikki fáa okkurt gott í posan.


JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-160 Hoyvík • Tórshavn



Auto Trade



Nýggir og brúktir eykalutir til flest allar bilar
– altíð góð tænasta og lágir prísir –
Bóndaheygur 20
Boks 253 • Fo-110 Tórshavn
Tel. 320 280 • Fax 320 282
post@autotrade.fo
www.autotrade.fo


## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 11 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | ÷5 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | ÷6 |
| Bukarest | ÷4 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 8 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | – |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | ÷7 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 34 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, undir 1000 hPa. í útsynning úr Írlandi fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.




Lágtrýstið sunnan fyr Írland fer norðureftir og dýpist og brúgvalagið haðani fer um Føroyar leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/02 kl. 06⁰⁰– 27/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,7°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 26/02 kl. 06⁰⁰–27/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 81,1 mm


Miele
... tær nýtist onga millión fyri at føla teg sum ein MÍELEONER
Elkeyp
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30
www.hth-kokar.com



Pioneer bilstereo
og alt tilhoyr
Vit senda um alt landið
NÓA
Tel. 45 68 68
Fartel. 75 75 75
Hvønn dag


## VESTFALLSKYRRINDI

19. febr.: Mánin næstur jørðini
23. febr.: Seinna kvarter
3. mars: Tendring
7. mars: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 28. feb | 04.40 | 17.07 | 03.40 | 16.07 | 03.55 | 16.22 | 06.40 | 19.07 | 07.40 | 20.07 | 02.55 | 15.22 | 01.55 | 14.22 | 04.55 | 17.22 | 05.55 | 18.22 | 04.25 | 16.52 | 05.40 | 18.07 |
| 1. mar | 05.30 | 17.54 | 04.30 | 16.54 | 04.45 | 17.09 | 07.30 | 19.54 | 08.30 | 20.54 | 03.45 | 16.09 | 02.45 | 15.09 | 05.45 | 18.09 | 06.45 | 19.09 | 05.15 | 17.39 | 06.30 | 18.54 |
| 2. mar | 06.17 | 18.40 | 05.17 | 17.40 | 05.32 | 17.55 | 08.17 | 20.40 | 09.17 | 21.40 | 04.32 | 16.55 | 03.32 | 15.55 | 06.32 | 18.55 | 07.32 | 19.55 | 06.02 | 18.25 | 07.17 | 19.40 |
| 3. mar | 07.01 | 19.23 | 06.01 | 18.23 | 06.16 | 18.38 | 09.01 | 21.23 | 10.01 | 22.23 | 05.16 | 17.38 | 04.16 | 16.38 | 07.16 | 19.38 | 08.16 | 20.38 | 06.46 | 19.08 | 08.01 | 20.23 |

5 707265 100050 >